# Poltikkur á Café

**Unga Tjóðveldið og Sosialistiskt Ungmannafelag skipa í apríl mánaði fyri politiskum fundum á Café Natúr í Havn. Fleiri ymisk evni verða roynd til kjakfundirnar.**

POLITIKKUR
*Heri á Rógvi*

Í kvøld, mikukvøldið, og tey næstu trý mikukvøldini verður Café Natúr karmur um politiskar fundir. Tað eru Unga Tjóðveldið og Sosialistiskt Ungmannafelag, ið skipa fyri fundunum.

Á fundunum verða ymisk evni tikin upp at venda. Tað verður eitt evni fyri hvønn fundin. Á tí fyrsta fundinum, sum byrjar kl. 20.00, verður evni íbúðarviðurskifti. Hetta er eitt mál, sum hevur fingið rættiliga nógva umrøðu í nógvu greinaskrivingini undan løgtingsvalinum, ikki minst frá teimum ungu valevnunum. Løgtingsvalið er eisini orsøkin til, at Unga Tjóðveldið og Sosialistiskt Ungmannafelag hava kastað saman um at gera hetta tiltakið. Annlis Bjarkhamar, fyrireikari og fyrrverandi forkvinna í Unga Tjóðveldinum, sigur, at Unga Tjóðveldið og Sosialistiskt Ungmannafelag áður eins og nú arbeiða væl saman.

Komandi trý mikukvøldini verður eisini skipað fyri fundum í Café Natúr. Tá vera evnini í nevndu raðfylgju: Skapandi mentan, ríkisrættarliga støðan og umhvørvi. Tað er einki yvir at dylja, at serliga spurningurin um ríkisrættarligu støðuna er ein spurningur, sum upptekur ung eins og eldri fólk, og hetta kann gerast til heitt kjak.

Fyrireikararnir lova lívligt kjak á fundunum. Fyri at skapa ein stemning og kanska fyri at gera tað minni fremmant, so hava fyrireikararnir valgt at halda fundirnar í Café Natúr.

Fundirnir verða skipaðir á tann hátt, at eitt umboð fyri hvønn flokk, ið er uppstillaður til løgtingsvalið, verður við. Hetta umboðið fær í trimum umførum loyvi til at sleppa framat. Fyrst í tríggjar minuttir, síðani í tveir og tey sleppa at runda av við einum minutti. Ætlanin er síðani, at ein hattur skal ganga runt, har fundarluttakararnir sleppa at seta spurningar. Fyrireikararnir lova harumframt., at áhoyrarnir sleppa til orðanna. Alt í alt er ætlanin at skipa fyri góðum og lívligum kjaki.

Til at halda skil á politikarum og áhoyrarum hava fyrireikararnir fingið hendur á Jón Briani Hvidtfeldt, útvarpsmanni. Hann verður orðstýrari til fundirnar.

Fyrsti fundurin verður sum sagt í kvøld, mikukvøldið, kl. 20.00 á Café Natúr. Øll eru vælkomin.



*Politisku Ungmannafeløgini skipaðu seinast fyri fundi á Háskúlanum. Nú hava Unga Tjóðveldið og Sosialistiskt Ungmannafelag kastað saman til nakrar fundir á Café Natúr, har pláss er fyri nógvum meiningum.*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Enn eitt lop aftur í 60 árini

**19. og 20. apríl fara dansiglaðir eldir ungdómar aftuir í 60 árini. Hetta er fimtanda árið á rað, at hondbóltsfelagið Neistin fagnar teimum góðu sekstiárunum**



*Tað verður væntandi dansað tað mesta náttina 19 og 20 apríl, tá aftur í 60 árini aftur verður á skránni.*

DANSUR
*Heri á Rógvi*

Fríggjakvøldið 19. apríl og Leygarkvøldið 20. apríl verður dansur í Íróttar- og samkomuhøllini á Nabb. Tá afturvendandi tiltakið aftur í 60 árini á skránni. Hetta er fimtandu ferð, at skipað verður fyri tiltakið. Tað er hondbóltsfelagið Neistin, ið hevur skipað fyri tiltakið, og tað hevur verið so mikið væl umtókt, at roynt verður aftur í ár.

Tey, ið vóru ung í 60 árunum fáa nú møguleikan at minnast aftur á gamlar dagar við teimum so kendu bólkunum, sum gjørdu seg galdandi tá.

Til tiltakið í ár hava fyrireikararnir fingið hendur á Thunderbirds úr Vestmanna, Robert & Enjoyers og Twilight.

Hetta er nýggjundi ferð, at Thunderbirds luttaka á aftur í 60 árini, og tað er eingin annar bólkur, sum hevur megnað at luttikið eins ofta.

Sum vant verður tiltakið bæði fríggjakvøld og leygarkvøld. Bólkarnir fara at skiftast um at spæla bæði kvøldini.

### Nakað serligt

Tað er eisini rættiliga nógv, ið eftirtíðin hevur fingið vita frá teimum so góðu sekstiárunum. Í heftinum, ið fyrireikararnir hava latið gjørt til endamálið stendur eisini at lesa um, at 60 árini vóru nakað serligt – eisini í Føroyum.

Tosar tú um tónleik og dans í Føroyum í sekstiárunum, sum sleppur tú heldur ikki undan at nevna støð sum Sjónleikarhúsið, har mangar søgur eiga heimstað.

Burtur úr heftinum kanst tú eisin at lesa, at ungu genturnar í sekstiárunum ikki plagdu at smakka sær á. Tað var bara onkur hendinga genta, ið vágaði sær hetta verk.

Tað verður eisini nokk at tíð og møguleikan til at minnast aftur til teir dansiglaðu dagarnar í Sjónleikarhúsinum og aðrastaðni hjá tí eldra ungdóminum, sum væntandi fer at flokkast í hópatal í Ítróttarhøllini á Nabb.

## Eldur í sethúsum á Eiði

**Skírisdag brendu eini hús í grund á Eiði.**

ELDUR
*Heri á Rógvi*

Skrísdag, 28. mars, fekk løgreglan í Eysturoynni boð um, at eldur var í einum húsum á Eiði. Talan var um eini sethús, har fólk búðu. Tað var tó lítið og einki at gera við eldin. Bert útveggirnir stóðu eftir, tá avtornaði.

Løgreglan í Eysturoynni upplýsir, at teir ikki kunnu siga, hvør orsøkin er til eldin.

Annars siga teir frá friðarligum døgum í Eysturoynni um páskirnir. Einki nevnivert er at boða frá, sigur vakthavandi á politistøðini í Runavík.



# Støkk framsýning í Klaksvík

**K.Í. høllin var leygardagin tann 30. mars karmur um fimleikaframsýning, sum fimleikafelagið Støkk skipaði fyri**

FIMLEIKUR
*Orð: Ragnhild Ellingsgaard*
*Myndir: SáH*

**Klaksvík:** Fitt av fólki var komið saman at hyggja at framsýningini, sum fimleikafelagið Støkk úr Runavík skipaði fyri seinasta leygardag.

Við í ferðalangnum vóru fleiri lið í ymsum aldursbólkum, og var framsýningin sera væl fyriskipað.

Fimleikafelagið Støkk hevur fleiri ferðir fyrr verið á vitjan í Klaksvík, og hvørja ferð hevur uppmøtingin til framsýningarnar verið stak góð.

Støkk hevur gjøgnum seinasta árið vunnið fleiri kappingar í landinum, og hetta sást eisini aftur á framsýningini.

Framsýningin var sera stórsligin og vøkur, og áskoðararnir fóru væl nøgdir til hús aftur eftir framsýningina.



*Heilt fitt av fólki var og hugdi at stórslignu framsýningini*








*Fimleikafelagið Støkk úr Runavík var í vikuskiftinum á vitjan í Klaksvík*